# Best vitjaða ólavsøkan nakrantíð

**Triðja ólavsøkuhaldið á Bryggjuni í Keypmannahavn gjørdist tað mest vitjaða higartil. Mett var at eini 2000 fólk stukku inn á økið hesar dagarnar til okkurt av mongu tiltøkunum, ið vóru á skránni**

ÓLAVSØKA Á BRYGGJUNI
*Anna V. Ellingsgaard*
anna@sosialurin.fo

Lítil ivi mundi vera um, at ólavsøkuhaldið í ár eisini var tað best eydnaða, og allastaðni hoyrdust fólk hava á orði, hvussu væl fyriskipað tiltakið var. Sum ein av gestunum tók til
- Her hendir allatíðina okkurt, men tú fært verið við í øllum alíkavæl.

### Okkurt fyri øll

Fyri líkasum at hita upp og skapa rætta ólavsøkudámin, byrjaði tiltakið við at kappróðurin í Havn var at hoyra úr stórum hátalarum, ið vóru settir upp uttanfyri á Bryggjuni. Runt um sótu fólk við borðini og lurtaðu altrá eftir, hvussu leikur og róður fór har heima. Uttan iva høvdu tey øll sínar favorittar, men tað er neyvan ov nógv sagt, at spenningurin illa fekk verið størri, tá slagið stóð hjá 10 mannaførunum millum Klaksvíking og Eysturoying.
Eftir kappróðurin úr Havn ólavsøkuaftan var farið undir restina av skránni fyri ólavsøkuhaldið á Bryggjuni. Við síni setanarrøðu hugleiddi Herálvur Joensen, føroyskur sendimaður í Keypmannahavn, við nøkrum væl valdum orðum um serstøku støðuna hjá føroyskum útisetum og týdningin av einum slíkum ólavsøkuhaldi.
Síðani kom helt serliga løtan, tá føroyski seksæringurin Norðbúgvin alment fekk handað føroyska flaggið og siglingarloyvi í havnini í Keypmannahavn, sum tann fyrsti føroyski báturin, ið fær slík rættindi.
Út á dagin var føroyskur dansur, matur, undirhald og tónleikur at uppliva bæði úti og inni á Bryggjuni. Á loftshæddini spældu Vestmenn upp til dans út á kvøldið, og skjótt var dansigólvið á tremur av vælhýrdum fólki, sum dansaðu til tann ljósa morgun.

### Ikki eitt eygað turt

Ólavsøkudag varð byrjað við gudstænastu í Christianskirken, har Bergur Jacobsen prædikaði. Sum eitt serligt innslag sungu Anna Maria Olsen og Agnar Lamhauge solo, meðan Stamen Stantchev spældi undir. Síðani var farið oman á Bryggjuna at hyggja at kappróðri millum bátar hjá føroysku róðarfeløgunum.
Beint áðrenn midnátt hoyrdist brádliga røddin hjá Heðini Mortensen úr hátalararnum. Eins og í fjør hevði hann eina heilsan at bera ólavsøkugestunum á Bryggjuni beint undan midnáttarsanginum. Mannamúgvan á Bryggjuni var nú serliga tøtt, og við Heina Davidsen á odda var midnáttarsangur á skránni, har somu sangir vórðu sungnir samstundis á Bryggjuni í Keypmannahavn og á Vaglinum í Havn.
Tiltiknað fýrverkið á Bryggjuni livdi í allar mátar upp til væntaninar, tá tað mest sum lýsti upp allan himmalin yvir Keypmannahavn. Tá so tríggjar rakettir til seinast fingu himmalin at lýsa í teimum føroysku litunum, var ikki eitt eygað turt, sum ein av mongu áskoðararnum tók til.



# Ólavsøkuróður í Keypmannavnar havn



*Tað var ein óvæntað og forvitnislig sjón, ið møtti mongu ferðafólkabátunum, tá flaggskrýddu føroysku bátarnir komu skúmandi inn móti Nýhavnini*

*Mynd: Kristvør hansen*



*- Ongin ivi er um, at róðarfeløgini her niðri ganga upp í hendan ólavsøkuróðurin við lív og sál, sigur Kristvør Hansen, formaður í róðrarfelagnum Neystið í Keypmannahavn*

**Ongin ólavsøka uttan kappróður – heldur ikki í Keypmannahavn, har føroyski kappróðurin setti sín heilt serliga dám á Kanalina ólavsøkudag**

ÓLAVSØKA Á BRYGGJUNI
*Anna V. Ellingsgaard*
anna@sosialurin.fo

Eitt av hæddarpunktinum á ólavsøkuhaldinum í Keypmannahavn er kappróðurin millum bátar hjá føroysku róðrarfeløgunum í Danmark. Í ár luttóku heilar níggju bátsmanningar úr fimm feløgum, og er hetta tað mesta til nakað ólavsøkuhald í Keypmannahavn.

### Forvitnislig sjón

Stigtakararnir stúrdu eitt sindur fyri, hvussu tað fór at gangast at leggja róðrarbátarnar, tí so nógv bátaferðsla vanliga er á leiðini, har róð varð. Men so skjótt, tað gekk upp fyri fólki, hvat var í ferð við at henda, tóku bátarnir atlit í allar mátar, so róðurin kundi fara fram uttan trupulleikar. Onkrir av teimum fylgdu enntá við róðarbátunum fyri at síggja róðurin tætt at. Tað var eisini týðiliga ein óvæntað og sera forvitnislig sjón, sum møtti mongu ferðafólkabátunum á Kanalin, tá flaggskrýddu føroysku bátarnir komu skúmandi inn móti Nýhavnini, og tað mundu vera fá ferðafólk, sum ikki høvdu myndatólið frammi hesa løtuna.

### Sum á ólavsøku ...

Bæði á Bryggjuni og í Nýhavnini stóðu spentir áskoðarar og róptu av fullum huga á "sínar" bátar. Í so máta minti stemningurin mest um ólavsøkuróðurin í Havn.
- Sjálvt um tað jú ikki er heilt tað sama, er ongin ivi um, at manningarnar ganga upp í hendan róðurin við lív og sál. Vit vilja jú hava okkurt at venja fram ímóti, so hesin róðurin og Ishøj Regatta hava stóran týdning fyri áhugan og drívmegina í róðrarfeløgunum, sigur Kristvør Hansen, formaður í róðrarfelagnum Neystið. Hon dylur ikki yvir, at bátarnir hava vant dúliga til júst hendan ólavsøkuróðurin, og at spenningurin hevur verið stórur.
Róð varð 600 metra teinin frá Knippelsbro inn til Nýhavnina, og gjørdust úrslitini hesi:

**6. mannafør, Kvinnur:**

| | |
|---|---|
| 1. Gongurálvur | 3.10.24 |
| 2. Knørrur | 3.21.56 |
| 3. Vesturskinið | 4.01.96 |

**6 mannafør, Menn:**

| | |
|---|---|
| 1. Skarvur | 3.00.26 |
| 2. Knørrur | 3.01.93 |
| 3. Gongurálvur | 3.02.84 |

**10. mannafør:**

| | |
|---|---|
| 1. Tvørábáturin | 2.42.63 |
| 2. Vábingur | 2.43.69 |

Vinnandi manningarnar fingu handað steyp frá formanninum í róðrarfelagnum Neystið, Kristvør Hansen, ið eisini er limur í stýrisbólkinum fyri ólavsøkuhaldið í Keypmannahavn.
Sum nakað rættiliga forvitnisligt varð nýinnsettið føroyski báturin í Keypmannahavnar havn, Norðbúgvin, dómsbátur í róðrunum.

Ólavsøka á Bryggjuni:

# Út um bygdagarðin

**- Endamálið við ólavsøkuhaldinum í Keypmannahavn er ikki minst at lata Føroyar upp fyri umheiminum. Við frálíku umstøðunum á Bryggjuni hava vit av sonnum flutt okkara ólavsøku út um bygdagarðin, sigur Niels Salmony, formaður í stýrisbólkinum**

ÓLAVSØKA Á BRYGGJUNI
*Anna V. Ellingsgaard*
anna@sosialurin.fo



*- Við frálíku umstøðunum á Bryggjuni er ein dreymur hjá okkum, sum skipa fyri ólavsøkuni í Keypmannahavn, vorðin veruleiki, sigur Niels Salmony, formaður í stýrisbólkinum*

Triðja árið á rað fór ólavsøkuhaldið á Bryggjuni í Keypmannahavn av bakkastokki seinnapartin ólavsøkuaftan. Við nýggju umstøðunum á Bryggjuni er ein gamal dreymur hjá fyrireikararnum vorðin veruleiki, og kann møguleikin at røkka endamálinum við tiltakinum nú neyvan gerast betri.

### Opinleiki virkar báðar vegir

- Vit hava hildið ólavsøku í Føroyahúsinum í nógv ár. Tað hevur eisini verið hugnaligt, men dreymurin hevur allatíðina verið at lata meginpartin av skránni ganga fyri seg uttandura. Bæði fyri at skapa rætta ólavsøkudámin, men avgjørt eisini fyri breiða kunnleikan til Føroyar og tað føroyska út til so nógv fólk, sum gjørligt, sigur Niels.
Hann leggur afturat, tað ikki er nøkur loyna, at myndin, danir og aðrir útlendingar hava av Føroyum, ofta hevur verið nakað einsháttað. Hinvegin hava føroyingar kanska ikki altíð dugað líka væl at lata sítt land og mentan upp fyri øðrum.
- Vit hava jú nakað, vit eru sera glað fyri, og tað vilja vit fegin vísa øðrum við ólavsøkuhaldinum. Reyði tráðurin í tiltakinum er at koma út um bygdagarðin og lata Føroyar upp fyri umheiminum. Opinleiki virkar jú báðar vegir. Vilt tú integrerast í eitt nýtt umhvørvi, mást tú lata teg upp fyri øðrum á ein hátt, so tú samstundis fært givið nýggja umhvørvinum nakað frá tær sjálvum , sigur Niels og leggur afturat, at opinleiki eisini er fyrsta treytin, um tú vilt markera teg sum viðleikara í einum nútímans, altjóðagjørdum heimi.